## Minningarorð:

## Minningarorð um Súsonnu Hansen

Best sum sólin fagrast skínur, deyðin inn um dyrnar trínur. Hetta kom fram fyri meg henda feigdar morgunin tórsdagin 9. mars, tá deyðin aftur setti síni lemjandi spor eftir seg her í býnum, – aftur ein ungdómur deyður av vanlukku, – Súsanna hjá Karl og Marnu var tað hesaferð, sum tikin varð burtur í sínum besta blóma – bert 19 ára gomul.

Tað er so tungt at skriva minningarorð um teg góða Súsanna. Stutt tíð er tað síðani, vit sótu inni hjá okkum og prátaðu um alt, sum hent var á Tvøroyri, – tú uggaði meg, tá eg hevði tað svárt eftir missin av beiggja mínum, vildi hava meg út – ella eisini bara vera hjá mær.

Ikki er tað hálvt ár síðani tú skrivaði minningarorð um Eyðun. At tú skuldi fara so skjótt aftaná – á sama meiningsleysa hátt – er ófatiligt.

Tú vart ein glað, evnarík og trúgvandi genta, sum ongantíð gloymdi at minna okkum á tað, sum rætt var – tú baðst okkum ungu koma við í Missiónshúsið, ella tú gavst mær sangir, sum eg skuldi spæla næstu ferð, vit komu saman. Altíð royndi tú at fáa fleiri við á møti og tað eydnaðist. – Saknurin er nívandi, og tú spyrt, hví skuldi alt hetta henda – ein dag fáa vit svarið.

Eisini dugdi tú at skemtast og hava tað stuttligt, og nógvar hevði tú vinirnar, hetta gleddist tú við og gjørdi alt fyri at røkta vinarlagið. Fyri teg var hetta eisini eitt týdningarmikið ár -– tú skuldi verða liðug við student, hetta gleddi tú teg til og so ætlaði tú tær út um ladoddarnar, har tú skuldi nýta løturnar at finna út av, hvat tú skldi læra til.

Marna og Karl, tit hava mist tykkara einasta barn, slagið er hart og saknurin er svárur. Í støðu sum hesari er tað bert Ein, sum kann hjálpa, og tað er Hann, sum eg veit, at Súsanna setti sítt álit á, og eg veit eisini, at í Hansara hendur hava tit eisini lagt tykkara stóru sorg, og bert har frá Honum er linni og hjálp at heinta. Harrin styrki tykkum og tykkara nærmastu.

Fyri okkum her á Tvøroyri endaði og byrjaði øldin við skelki og sorg, – fleiri av okkara ungu vinfólkum ikki 20 ára gomul hvíla undir grønu torvu, og vit syrgja so sáran.

Eg fari altíð at minnast teg, góða Súsanna – hvíl í friði og takk fyri alt.

**Vinur tín, Trygvi**

## Ein heilsan til mammu – Camilla Heinesen

Góða elskaða mamma, eg vil her bera tær eina hjartans tøkk, fyri alt tað sum tú hevur givið mær ígjøgnum lívið og alt sum eg lærdi av tær. Ja, góða mamma, tú vart altíð klár at hjálpa okkum, bæði í sorg og gleði, tú stóð sterk við okkara lið. Tað er ikki so lætt at skriva hesar reglur, nú vit skulu titl at siga tær farvæl her á fold, men góða mamma, nú ert tú komin heim til tíni, sum tú saknaði so nógv.

Góða mamma, tú hevur verið pápa ein góð kona og okkum ein góð mamma, sum vit øll elskaðu so høgt, takk fyri alt. Vit møtast øll aftur heima í himlinum.

Heilsan við Korintbrævinum 2, kapitul 5, vers 1. Tí at vit vita, at um okkara jørðiska tjaldbúð verður brotið niður, tá hava vit ein bygning frá Guði, hús, sum ikki er við hondum gjørt, ævigt í himnunum.

**Margith**

## Anna Maria Sørensen
## fødd 11. juni 1997 - deyð 16. mars 2000



Hósmorgunin 16. mars. Ein ómetaliga vakur morgun. Sólin skein av heiðum himli. Umsíðir fingu vit ein dag við lýðku og børnini gleddust, nú varð veður at spæla uttandura.

Anna Maria var hendan morgun millum børnini, ið gleddust um góða veðrið. Eins og aðrar dagar, var Bólsá, ið vanliga ikki er størri enn ein renna, hendan dagin spælipláss hjá Annu Mariu og beiggja hennara Absalon. Men hendan dagin var áin lúnsk. Hon dróg kavan úr fjøllunum til sín, fyri at kunna flyta Annu Mariu inn í Himmalin, har Jesupápi stóð og bíðaði eftir henni. Nú hevði Hann brúk fyri Annu Mariu.

Áin smoygdi hennara jørðiska búna av henni, og flutti hana heim í hennara Himmalska bústað, har hon hevur fingið hvítan búna og er vorðin ein eingil í einglaskara Harrans.

Meðan Anna Maria var okkara millum, var hon ein sannur eingil, ein stór gleði fyri síni foreldur Jannie og Esmar, og fyri beiggjan Absalon. Nú er tómligt innanveggja, nú hennara káta og klára rødd er tagnað.

Svárast er sorgin hjá tykkum Jannie og Esmar. Má harrin geva tykkum styrki og troyst.

Eisini hjá tykkum øllum, ommum og abbum, Marjun, Søren, Eivind og Mia og absalon, má Harin styrkja tykkum. Fastir, pápabeiggjar, mostrar, mammubeiggi og langommurnar. Anna Maria var til stóra gleði fyri øll, sum ein sólstrála. Ikki minst fyri tykkum systkinabørnini Marjun, Søren, Sólva, Karina, Eivindur og lítli Rógvi, tit vóru so ómetaliga góð við annu Mariu. Hjá tykkum er ringt at fata, at hon ikki er tykkara millum meira. Má Jesupápi troysta tykkum í stóru sorg tykkara.

Og tú Edvard góði, tað mundi fara kalt niðureftir rygginum á tær, tá tú fann jakkan hjá bróðurdóttrini í ánni.

Tá vóru tit vís í, at áin hevði tikið Annu Mariu. Og Marner góði, tað skuldi gerast tín lutur at finna annu Mariu. Tað varð ein tung løta, tá tit tóku hana upp.

Góðu Jannie, Esmar og Absalon. Vit hugsa um tykkum hesar dagar, og vit vita, at tey eru nógv, ið biðja fyri tykkum. tit eiga nógvar góðar vinir, tað vísti tann stóri skarin, ið fylgdi annu Mariu, tykkar elskaðu dóttir og systir, til hennara seinasta hvíldarstað á foldum.

Má Harrin síggja til tykkum, og geva tykkum troyst og ugga í døgunum, ið koma.

Ærað verið minnið um elskaðu, lítlu annu Mariu.

**Malan og Margreth við húski**

## Sólfríð Lydersen
## fødd 23. apríl 1999 - deyð 7. september 1999



Tankar okkara leita eisini aftur til 7. september 1999. Tá varð eisini sorgardagur á viðareiði. Lítla Sólfríð varð tikin heim til Harran, bert 5 mánaðar gomul.

Góðu Elsebeth og Ludvík, ta stuttu tíð, tykkum unntist at hava Sólfríð hjá tykkum, varð ein rík og signað tíð. Hon var ein sólstrála, og Elsa gleddist yvir at hava fingið eina lítla systir.

Tit høvdu júst keypt hús og stríddust við at væla um, so tit øll fýra kundu flyta inn í tykkara egna heim. Men Harrin vildi tað annarleiðis. sólfríð gjørdist sjúk, og alt meðan hennara lítla likam nívdist av sjúku, og hon viknaði alt meira og meira, varð mong bønin send upp til Himmalska Faðir okkara, um at lata hana liva. Men Jesupápi hevði brúk fyri henni heima hjá sær.

Góðu Elsebeth og Ludvík. Tað vóru svárir dagar fyri tykkum, tá tit sótu hjálparleys uppi yvir Sólfríð niðri á Ríkissjúkrahúsinum, og sóu tykkara elskaðu dóttir fara í Harrans hendur. Svárast mundi tó vera, tá tit vóru komin í Vágar, og kistan við lítlu Sólfríð stóð eftir í Kastrup. Tað man hava verið longsta nátt í tykkara lívi.

Má Harrin styrkja og troysta tykkum.

Góða lítla Elsa. Hetta hevur verið ein ring tíð fyri teg, tú vart so góð við tína lítlu systir. Nú bleiv so eisini tín besta vinkona tikin upp til Jesupápa. Tú og Anna Maria vóru so góðar, vóru næstan ikki til at skilja sundur. Nú gongur tú og grætur eftir annu Mariu. Tað man vrða ringt hjá tær at fata, hví øll sum tú ert so góð við, fara upp til Jesupápa.
Góðu tit øll, ommur og abbar. Hanna, Ditlev og elsa og Rólant, mostrar, fastrar, mammubeiggjar, pápabeiggi, langommurnar og systkinabørnini øll.

Má Harrin troysta tykkum, og hjálpa tykkum ígjøgnum hesa sváru tíð.

Góðu Elsebeth, Ludvík og lítla Elsa, vit hugsa um tykkum, og vit eru mong, ið biðja fyri tykkum. Má Harrin styrkja og troysta tykkum. Vit goyma minnið um lítlu sólfríð í hjørtum okkara.

Ærað verið minnið um elskaðu lítlu Sólfríð.

Malan og Margreth við húski.



e-mail: jakup@sosialurin.fo
**Ítróttur**
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

*Lesið ítróttin á internetinum www.sosialurin.fo*

# Herfølge á meistarakós

*Superligan: Jákup Mikkelsen og liðfelagarnir vóru tað mesta av tíðini sannførandi, tá teir øktu munin niður til kappingarneytarnar til sjey stig*



*Jákup Mikkelsen og liðfelagararnir í Herfølge hava nú greiða leiðslu í superligaini*

Tað eru ellivu umfør eftir at spæla í hesum kappingarárinum í donsku superliguni. 28. mai verður greitt, hvør vinnur DM, og eftir at Herfølge mánakvøldið sendi Viborg aftur til Jyllands við ósigri í viðførinum, er støðan tann, at Lyngby og Brøndby, sum eru á øðrum og triðja plássi, skulu í hvussu so er brúka trý umfør at fáa Herfølge aftur í.

At Herfølge ikki uttan nakað sum helst fer at geva skarvin yvir var sjón fyri søgn mánakvøldið. Sjálvsálitið var í topp frammanfyri áskoðarafjøldini á heimavølli og øllum teimum, sum sóu dystin á TV3+ sjónvarsrásini.

Tølini boða kanska frá teprum sigri, men tað var ongantíð talan um nakra hóttan frá Viborg. Seinna málið hjá teimum stútaði Heine Fernandez, tá vanliga tíðin var farin. Frísparksinnleggið kom uttarlaga frá, at eftir at málsókni framherjin hevði vunnið stríðið í luftini við ein verjuspælara, megnaði Jákup Mikkelsen, ið var so uttarlaga staddur, sum tað ivaleyst var natúrligt at vera í hesi støðuni, bara við aðrari hondini at sláa bóltin upp í nettakið.

**Ágangandi**

Avrikið hjá Herfølge var verdugt fyri eitt topplið. Teir løgdu trýst á langt frammi á vøllinum, og ágangandi spælið hevði við sær, at mótstøðumenninir kendu seg kroystar, og harvið gjørdu teir eina rúgvu av persónligum mistøkum.

Akkurát tá fyrra umfarið var hálvrunnið, bar eitt sovorðið mistak fyrsta málið við sær. Ein vánalig afturlegging í vinstra verjuborði hevði við sær, at stóri álopsmaðurin Jesper Jacobsen kom ímillum, á baklinjuni sneiddi hann framvið málverjanum og trillaði móti málinum. Ein verjuspælari tveitti seg og bjargaði á strikuni, men ólukkutíð fyri hann og liðfelagarnar, so fór bólturin í høvdið á liggjandi viðspælara og so inn um strikuna.

Átta minuttir seinni økti Jesper Jacobsen, sum eftir dystin varð kosin dagsins maður. Kenneth Jensen sendi upp á tvørs, og eftir eitt lítið sindur av aftur og fram setti vandamikli maðurin hælin á bóltin, sum fór í málið.

Viborg setti tveir nýggjar spælarar inn eftir steðgin, men tað tóktist ikki hjálpa nógv, tí Herfølge økti til 3–0, tá seinna umfarið var fýra minuttir gamalt. Jesper Jacobsen spældi toppskjúttan á liðnum Jesper Falck púra blankan.

Gestirnir komu eitt sindur meiri við í spælið, sum 2. hálvleikur leið. Sviin Hans Eklund minkaði um munin við handara stólpan, eftir at flatt innlegg var komið úr høgru. So setti John Faxe Jensen seg sjálvan á vøllin, og hóast Viborg enn eina ferð minkaði um munin, so var sigurin ongantíð hóttur.

**Jákup ikki nógv kroystur**

Føroyski landsliðsmálverjin hjá Herfølge hevur ofta havt meiri at gera, enn hann hevði mánakvøldið. Flestu uppgávurnar hjá honum vóru at spæla skilagott út til liðfelagarnar, eftir at teir høvdu lagt aftur til hansara. At tað kemur væl við at hava ein góðan fótbóltsspælara millum stólparnar sást aftur og aftur hjá Herfølge.

Meðan støðan framvegis var 0–0, kom Heine Fernandez einsamallur leysur við Jákupi Mikkelsen, sum bjargaði. Og eina aðru ferðina sendu teir í Viborg við síðuna av. Einar tvær ferðir bjargaði Jákup langskotum, og onkra ferðina pilkaði hann høgar bóltar niður úr luftini.

Onkur av fjølmiðlafólkunum vildu vera við, at Jákup átti at havt tikið royndina, sum bar seinna málið hjá Viborg við sær, men tey flestu vildu ikki geva føroyska málverjanum skyldina fyri málið.

Komandi sunnudag skal Herfølge spæla á útivølli móti AB. Uttan mun til hvussu tað fer at gangast, so er tað greitt, at Herfølge verður fremst í superliguni, tá tað fara at resta tíggju umfør. jh

# Eina viku í Watford

*Ungu B36 leikararnir Kenneth Jacobsen og Klæmint Matras, hava júst verið eina 5 daga langa ferð í Onglandi, har teir hava roynt síni fótbóltsevnir í Premier League felagnum Watford.*



*Tað er Jákup í Stórustovu, sum hevur fingið teir báðar ungu B36-leikararnar til Watford, eins og hann hevur fingið aðrar ungar fótbóltsleikarar út um landoddarnar at royna seg*

HEINI Í SKORINI

24. mars fóru Klæmint Matras og Kenneth Jacobsen, báðir føddir í 1981, til Watford at royna seg. Kenneth og Klæmint leika dagliga í B36, men nú hava teir í 5 dagar roynt seg við lítla Premier League felagnum. Og teir lata væl at tíðini í Watford.

– Vit trenaðu hvønn dag, uml. hálvaannan til tveir tímar. Men onkrar dagar, tá vit vandu við unglingunum, vandu vit tveir tímar, inn at eta í ein hálvan tíma, og so aftur út at venja í uml. 45 min, og Kenneth leggur afturat, at tað til tíðir var nokk so strævið.

Spurdur hvussu støði var í mun til Føroyar, sigur hann, at unglingarnir har niðri vóru ikki nógv betri enn í Føroyum.

Kenneth er ikki vísur í, um teir aftur fara at hoyra frá Watford, men sigur, at honum dámdi bara væl tíðina sum fótbóltsleikari har niðri.